Nakað soleiðis virkar hettar sokallaða privat/kommunistiska systemið, har alment fæ er ein fortreyt, av nøkrum kallað studningur, av øðrum »rættvísisgjørt« og kalla almenna afturberingin, sum í praksis er ein rokning frá nøkrum skipaeigarum.

Innari Europæiski marknaðurin er farin at virka og ein fortreyt fyri at fáa atgongd til hendan nýggja, opna marknaðin hjá EF, er m.a. bann av øllum studningsaktivitetum.

Tað verður neyðugt bæði við avtøku av tí kenda, almenna partinum og so hesum »útlikningsstudningi«, ið verður brúktur í sølusamtakinum Føroya Fiskasølu.

Fortreyt fyri atgongd til nýggja, opna marknaðin í EF eru vanligar, altjóða reglur ið galda fyri fría og harða kappiung.

Síðani fráboðan BD í mars 1988 um eina dobling av eksportvirðinum fyri føroyska útflutningsframleiðslu, hevur valda deyðatøgn.

Tá nú eitt tilíkt úttalilsi einans kann byggja á eina konstatering av at føroysk útflutningsvinna sum er, einans framleiðir vøru sum gevur helvtarvirði á eksportmarknaðinum, og sum tí av hesari orsøk hevur stóran, almennan studning fyri neyðini, so verður reistur hesin spurningur:

»Kann tann 10 mánaðar langa tøgnin, síðani mars proklamatiónina hjá Fiskasølustjóranum, tulkast sum ein tvíhaldan um ein rakstur av okkara útflutningsvinnu, ið framhaldandi einans skal geva helvtarvirðið?

Um so er, vil tann politiska avleiðingin av hesum verða játtanir av studningsupphæddum av almennum fæ, til tess framhaldandi at tryggja rakstrinum av tí flotanum ið er fyri neyðini, um haldast skal fram við somu kós.

Tá tað er ein sannroynd at hendan helvtarvirðisframleiðsla ikki longur ber kostnaðin av samfelagsvøkstrinum, tí tað verða alt fleiri og fleiri at »býta« hesa stagneraðu útflutningsupphædd, ið vil seta størri og størri krøv til studningspartin, líka har til at alt steðgar upp, og tí er eyðsæð at hettar ikki longur ber til.

Til tess at lýsa hesa støðu og geva henni fatuligan, visuellan dám eru vístar tvær myndir av Føroya Flakavirki. Myndirnar eru symbolskar og tølini áleiðis tøl. Við støðið í úttalilsum BD frá mars 88 ber til at skjóta seg inná procentulle býti millum lítið gevandi tilvirking og rímuliga vælbetalta vøru.

Nøgdarmentan — tonsamentan?

Nýtt er meðalvirðið uppá 20 kr.pr. eksportkilo.

Tað verður gingið útfrá at tað fáast 15 kr. fyri kg. av reyðum blokki og 36 kr. fyri kg. av einari góðari lbs. vøru.

Samlaða eksportvektin er sett til 45.000 tons, ið er umsett fyri 900 mill.kr. og soleiðis umboðar tað helvtarvirði, ið tað er gjørligt at fáa fyri hesa eksportvøru frá Føroya Flakavirki.

Við at rokna við støði í omanfyrinevndu tølum, sæst á mynd 1 at vit á Føroya Flakavirki framleiða 76% av lítið gevandi blokvøru, stavandi frá niðurgjørdum nøgdartonsum, og umleið 24% av lbs.vøru, stavandi frá monnum og skipum, sum soleiðis, uttan samsýning, leggja uppá land nøkur fá dygdartons. Á mynd 2 sæst hvat ið er fyri neyðini um mars porklamatiónin fiskasølustjórans, skal gerast veruleiki. Meðalvirði er 40 kr.kg.

Fyrsta fortreytin er at marsproklamatiónin verður gjørd til sjálvan málsetningin hjá Føroya Flakavirki. Hetta ber fyrst og fremst í sær at veiðurfarið »NØGD« verður avloyst av veiðufarinum »DYGD«.

Onnur fortreytin er at leiðslan á Føroya Flakavirki vil hendan málsetning ið ber í sær eina tvífaldan frá 900 til 1800 mill.kr., í eksportvirði árliga.

Triðja fortreytin er stjórnarpolitisk og skal hendan lýsing av føroyskari útflutningavinnu við árslok 1988 tí enda við einum fyrispurningi til formennirnar fyri teir politisku flokkarnar í Føroyum, sum nú royna at skipa stjórn.

»Eru tit, landsins kosnu menn, varðugur við hesa helvtarvirðisstøðu ið ræður okkara útflutningsvinnu, og hvat eru tykkara heilt ítøkiligu ætlanir í samband við hesa støðu?, tí ásannast má at tøgnin hevur talað«.

29. des. 1988
John Smith





Síða 8 tíðindablaðið sosialurin Nr. 49 — 30. april 1988

Birgir Danielsen, fiskasølustjóri, viðgongur

— Vit hava ein skeivan fiskiflota

— Vit hava bygt skip til at fiska so nógv tons so rationelt sum gjørligt. Vit mugu nú ásanna, at hetta hevur verið tann skeiva gongdin. Okkum tørvar ein flota, sum leggur seg eftir at fáa eina væl hagreidda og góða fiskavøru til lands. Við slíkum flota høvdu vit kunnað fingið munandi meira burtur úr tí nøgd, vit í dag fiska.

M.a. hetta segði Birgir Danielsen á tíðindafundi í vikuni í samband við aðalfundin hjá Føroya Fiskasølu.

Vit hava møguliga ikki satsað uppá tey røttu skipini, segði Birgir Danielsen. Hann sipar her til teir rationellu trolararnar

Møguliga eru skip sum Fugltúgvan rætta svarið uppá, hvussu vit fáa meira burtur úr okkara fiskastovnum, sigur Birgir Danielsen

Tað er møguleiki at fáa økt virðið á fiskautflutningi okkara, uttan at vit harvið økja tonsatalið. Góðska vit vøruna meira her heima, kunnu vit í framtíðini fáa upp ímóti 40 kr. kilo fyri ta vøru, ið vit í dag fáa góðar 20 kr. fyri. Men ein fortreyt fyri tílíkum útvikling er, at fiskurin, sum verður landaður, er munandi betur hagreiddur og [illegible] í nógv betri standi, enn hann er í dag.

M.a. hetta kom fram á tíðindafundinum, sum Føroya Fiskasøla helt í sambandi við aðalfund í vikuni. Birgir Danielsen, fiskasølustjóri, vísti á, at vit mugu koma burtur frá at hava skipini úti í upp til 10 til 14 dagar í senn, áðrenn tey landa veiðuna. Fiskurin skal helst ikki vera meira enn nakrar fáar dagar, væl isaður og hagreiddur skal ein yvirhøvur geva sær far um at økja munandi um útflutningsvirðið.

Broyta hugsunarhátt

Higartil hava vit so bara hugsað í tonsum, segði hann og helt, at tíðin er komin hartil, at vit mugu broyta hendan hugsunarhátt.

Hann helt fram: — Hvør er so orsøkin til hesa skeivu gongd, kann ein spyrja. Møguliga hava vit ikki tey røttu skipini. Vit satsaðu jú uppá Grønland og New Foundland og líknandi leiðir í norðuri, men vóru so tvingaðir á heimaleiðirnar og vóru somu skip tikin heim at fiska. Vit hava møguliga ikki verið varug við, at skipini hava ikki verið tey røttu til broyttu umstøðurnar, kanska hava tey verið ov stór, tí tað er ein onnur vøra, vit skulu hava í land her heima, enn hana vit veiddu á fjarleiðum.

Og Birgir Danielsen segði víðari:

— Eg vil ikki siga, at vit skulu fara aftur til útróðurin, sum hann var fyrr, men okkurt millumting áttu vit at funnið fram til.

Hvørji skip!

— Heldur tú tá, at skip sum Sæturn [illegible] og Fugltúgvan eru rætta svarið?

— Ja, møguliga. Men hvussu økonomiurin verður og hvussu samlaða myndin fer at síggja út, skal eg ikki siga nakað um.

Hesi skip hava so møguleikan at koma við eini vøru, har meginparturin av henni kann brúkast til at framleiða eina lidna vøru við, sum í dag hevur ein prís uppá einar 40 kr. kilo. Men túrarnir vera so stytri, og eg veit ikki júst, hvussu økonomiurin við línuskipum sammett við trolarar verður. Tað má ein so meta um.

Birgir Danielsen heldur, at tað er fávitskt yvirhøvur at hugsa um at fáa prísir upp móti 40 kr. kilo fyri lidnu vøruna, um vit senda skipini út at fiska í 14 dagar, áðrenn tey av-reiða.

Rationalitetur

— Men heldur tú ikki, at orsøkin til hesa skeivu gongd við tonsamentaliteti skal finnast hjá tí støðugt økta trolaraflotanum. Áttu vit kanska ikki heldur at havt satsað meira uppá línubátar og útróðrarbátar annars heldur enn trolarar?

— Hatta er ein áhugaverdur spurningur. Hatta er ein spurningur um rationalitet. Eg havi ongantíð verið tilhangari av, at vit skulu brúka minni rationellar hættir til at fáa hendur á fiskinum. Men eg dugi at síggja, at hesin spurningurin er meira kompleksur enn so, tí her kemur jú góðskuspurningurin inn í myndina eisini.

Eg kann í hvussu so er siga nú, at tað nyttar ikki at oysa túsundtals tons upp á land og bara máta í tonsum. Ein er eisini noyddur at hugsa um endavirðið av fiskinum.

Rolls Royce!

— Men heldur tú ikki, at menn hava lagt seg ov nógv eftir at byggja trolarar heldur enn útróðrarbátar og línuskip?

— Eg nam við hetta á aðalfundinum hjá Sjóvinnubankanum. Vit hava fingið allar hesar flottu trolararnar. [illegible] elektronikki. Men ressursirnar eru als ikki til hesa útbygging. Spurningurin er, um vit ikki [illegible] at koyra í einum Rolls Royce, men at vegirnir hóska seg bara ikki til hesar dýru bilarnar.

— Nú hevur tú í onkrari oddagrein í »Okkara millum« víst á, at gamla sluppin Ester er besta fiskiskipið í flotanum. Hvat vildi tú við tí?

Hetta var ein konstatering. Eg ynskti at fáa eitt orðaskifti í gongd. Tí veruleikin er tann, at Ester er tað besta skipið í flotanum.

— Men eru umstøðurnar umborð á hesum skipi tíðarhóskandi?

— Nei, tað eru tær heilt

Grein í Sosialinum frá apríl í ár, har Birgir Danielsen, fiskasølustjóri, kemur fram við sínum sera áhugaverdu úttalilsum um øking av eksportvirðinum